

*Lyklaorðini í summarmótanum eru:*

# STUTTLEIKI OG GLEÐI

[ Á stóra og vælgerandi Versace showinum, »Life's Ball« sum varð hildið til frama fyri AIDS og HIV gransking, var rákið tað sama. Stórmynstrutir kjólar við stórum 80'utum sólbrillum, Sterkir litir og tunt toy høvdu veruligt yvirtak á catwalkinum í Wien. Eisini Donatella Versace sampakkaði við mótan á pallinum í sínum sterkt appelsingula og tunna kjóla]

MÓTIN á alheimsins catwalkum vísir nú sama rák. Summari› ver›ur fylt av **Litum**.
Allir sterkir, klárir og gla›ir litir eru nú av álvara vi› í spælinum aftur.
**Mynstrum**. Kjólar, taskur og blusur vi› stórum prenta›um mynstrum eru eisini in aftur.
TA› er loyvt at stuttleika sær vi› mótanum og seta mynstur og litir saman á
stuttligasta hátt. **Gjøgnumskygni**. Tunn toysløg -alt frá chiffon til heimabundi›-
mugu gjarna vera gjøgnumskygd og so løtt, at tey flákra í vindinum.
Konufólka mótin er vor›in femininur, so **kjólar** eru í summar eitt »mást«.







[ Eisini í Bankok, har Miss Universe kappingin júst hevur verið, vóru heimsins vakrastu damur klæddar í fremsta mótan. Miss Pólland var í einum knallreyðum chiffonkjóla við Polkaprikkum og stórstríputum mynstrið. Núverandi Miss Universe, ið er úr Avstralia, var í einum løttum turkisum kjóla við aqua littum perlum ]



[ Russiski sniðgevin Miam Shvili vísti á Miami Fashion Week, at fíntbundin og gjøgnumskygd sjal í sterkum litum, sum hava verið nógv nýtt í Føroyum í eina tíð, framvegis eru modernað. Hetta hevði hon valt at pynta við perlum og blomstrum, men tað hevði helst verið eins vakurt uttan pynt. So ballið tykkum bara væl inn, so eru tit við... ]



[ Á mótasýningini hjá Pierre Balmain, sum var hildin í Cairo, Egyptalandi, var høvðusevnið stór mynstur, við íslettum av sterkum, fangandi litum ]







## MÓTARÁKIÐ TIL HUNDAR

Og eftirsum vit nú eftirhondini hava fingið bæði smá– og stórhundafelag í Føroyum, so er kanska eisini hóskandi at vísa tað nýggjasta úr mótaheiminum fyri hundar.

Nei, tað er ikki lygn. Hesar myndirnar eru av einum hunda-catwalki í Jakarta.

Tað er nevniliga vorðið ógvuliga modernað at hava smáar hundar, og sjálvsagt skulu smáu staklarnir eisini hava mótaklæðir.

Mótin við smáum hundum er komin til Føroya, spurningurin er bert nær mótaklæðini til teirra eisini fara at koma.

Men hetta er so tað, sum er in beint nú, skuldi onkur verið áhugaður